# Ætlaða vatnorkuút



*Vatnorkuútbyggingin í Dølum fevnir eisini um allar áir í Hvalvíksfjøllunum og líka suður móti Leynavatni. Reyði liturin er samlitunlar og guli er avfallsøkið (Kelda: SEV)*

**Vísandi til, at grundgevingarnar hjá SEV fyri útbygging av vatnorkuni ikki eru sannlíkar og tá vatnorkuútbygging í Føroyum als ikki loysir seg fíggjarliga, haldi eg, at veruliga grundgevingin hjá SEV er at útbyggja vatnorkuna og leggja so nógv lendi sum møguligt undir seg áðrenn 2013 fyri at styrkja um sína støðu, tá vatnorkuloyvið hjá teimum gongur út, skrivar Poul Hansen í hesi kjakgrein**



*Breiðá í Saksun verður turrløgd*

## Kjakgrein



**Poul Hansen**
post@sosialurin.fo

SEV hevur nýliga kunngjørt ætlanir at útbyggja vatnorkuna í 3 støðum.

Tær eru:
1. **Dalar norðanfyri Vestmanna**
2. **Víkavatn v.m.**
3. **Eystursíðan av Vágoy**

Í hesum umfari verður bert hugt eftir útbyggingarætlanini í Dølum. Hinar ætlaninar verður vent aftur til seinni.

Dalar nevnist landið, sum er norðanfyri Mosarøkur og Ørvitsfelli og sunnanfyri Malaknúk, Koppenni og Borgina, vestanfyri Saksunardal.

Hetta er stórbært land, við ríkum fuglalívi, villum víddum, vøtnum, áum, gjáum, dølum og botnum. Stórt sæð órørt av mannahondum.

Størstu áirnar í Dølum eru Heljardalsá, Reyná, Dalá og áin Eysturi í Dalinum.

Eystantil í Dølum, sum nevnist Úti á Dølum vil SEV gera eina stóra byrging, sum skal rúma vatnið frá nevndu fýra høvuðsáum í Dølum.

Harumframt skulu samlitunnlar gerast, sum skulu savna allar áir norður móti Saksun og allar áir Hvalvíksmegin Saksunardal heilt suður í Toftadalsáir sunnafyri Hvalvík og føra hesar áir í byrgingina Úti á Dølum.

Frá Toftadalsáum snarar samlitunnilin vestureftir og tekur ovasta partin av Dalá og Argisá, sum báðar renna í Leynavatn. Vatnútskiftingin í Leynavatni minkar tí eisini í stórum.

Sunnanfyri Dalar – vestureftir – skulu áirnar í Djúpadali, Øksnadali og Nálagjógv takast.

Allar omanfyri nevndu áir skulu í samlitunnilum førast norð í Dalar fyri síðani at renna suðureftir í tunnli í Vatnið í Fonsdali

Í Saksun skal Breiðá úr Vatnsdali takast.

Dalá og Stórá í Saksunardali skulu turrleggjast

Í Saksunardali renna tvær áir. Dalá rennur í Saksunarvatn og Stórá rennur millum Hvalvík og Streymnes

Heljardalsá, sum rennur úr Dølum í Saksunardal skal turrleggjast.

Heljardalsá er høvuðsáin, ið rennur í Dalá, sum soleiðis missur høvuðsæðrina. Dalá vil tá fáa minni enn helmingin av vatni og vatnútskiftingin í Saksunarvatni minkar tí við meira enn eini helvt.

Verður Víkavatn v.m. eisini tikið, verður Dalá heilt burtur og Saksunarvatn fær ikki meira vatn enn tað regn, ið regnar **á** tað.

Sunnanfyri Dalar, Hvalvíksmegin Saksunardal renna Oksagilsá og Ravnagilsá saman við Hóraldstoftrætt í Saksunardali og verða tá til Stórá í Hvalvík.

Saman við Bjendalsáunum eru hesar áir lívsæðrarnar til Stórá. Allar hesar áir skulu takast og í samlitunnil førast til byrgingina Úti á Dølum.

Tá hesar áir verða tiknar, verður næstan einki vatn í Stórá í Hvalvík, sum sostatt eisini verður turrløgd.



*Í Króki í Dølum. Verður turrlagt*

### Hví vatnorkuútbyggingin?

SEV boðaði frá, at til tess at økja el-framleiðsluna við varandi orkukeldum frá 45% til 55% = 10% skulu 1.600.000.000,00